Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæra kona mín og góða móðir, vermóðir, omma og systir okkara

Jona Samuelsen
ættað úr Froðba, búsitandi í Havn

andaðist og varð jarðað.
Ein tøkk til heimarøktina fyri serkøna hjálp og umsorgan í heiminum.
Tøkk fyri blómur, kransar, vitjanir og uppringingar.
Somuleiðis ein serstøk tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar, gravarar, berarar og til tykkum mongu, sum í góðveðrinum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Vegna familjuna
Jørgen, Hervør, Regin, Birgir og Finnbogi

Sosialurin i Sosialurin Sosialurin Sosialurin

Kristoffur Joensen á Argjum 80 ár

21. juli 1922 er Kristoffur føddur. Hann var úr barnaflokkinum hjá Nesakristinu og Jóhan hjá Lonajógvandi, ættaður úr Miðvági - úti í Lið í Sørvági, tað var stutt at siga eitt vanligt fiskaraheim. 7 vóru tey í systkinaflokkinum.

Blaðungur fór Kristoffur til skips, onkran feskfiskatúrin var hann í Skotlandi undir kríngnum. Sigldi við "Royndini", sum Sørvingar áttu. Var í Grønlandi við "Kúrbergi" við Johan í Hoyvík, við snøri. Fór á skúla og tók prógv sum setuskipari. Um tað mundið komu tey saman, Gugga og Kristoffur, giftust og fingu sonin Paula, búðu tá hjá verforeldrunum. Bygdu á Argjum í 1952. 3 eru børnini hjá Guggu og Kristoffuri, Pauli, Kjartan og Malla. Gugga doyði í 1993.

Kristoffur fórdi snurruváðsbátin "Akranes", og royndu teir í Norðsjónum. Louis, Poul Arne og Kristoffur, brøðurnir og aðrir sørvingar áttu "Akranes", keyptur til Føroya í 1946, og teir høvdu hann í 5 ár og væl gekst; men so flytur Ísland fiskimarkið út, tað var stóri smeiturin fyri snurruváðsbátarnar.

Nógv kenna Kristoffur, frá árunum hann var fiskari, teim árum, hann var arbeiðsformaður á Bacalao og síðani sum leiðari á pakkhúsdeildini hjá Strandfaraskipum Landsins.

Krisoffur verður nevndarlimur í Havnar Arbeiðsmannafelag í 1976, samstundis skrivari. Í hesum tíðandi álitisstarvi sat hann, til hann leggur frá sær fyri aldur í 1993.

Kann verða nevnt, at Kristoffur eisini nam prentsmiðjuyrkið, stutt skifti var hann á prentsmiðjuni hjá Arnold Øster, har var bróðurin Poul Arne frammanundan!

Landbúnaðatátturin hjá Kristoffuri man vera frá tíðini sum hjálparmaður hjá verpápanum, tokka og innlit í henda forna siðaarv føroyinga hevur hann mest sum ítriv.

Mangan hoyrist treysta songrødd hansara - og væl dámar fólki m.a. at líða á "teir fýra".

Vinarlig kvøða á 80 ára degnum, frægi javnaðarmaður á Argjum.

Sjálvan føðingardagin heldur Kristoffur saman við familjuni.

- jl

Starv hjá Kloosterboer

VIT SÓKNAST EFTIR einum fólki at taka sær av goymslustýring, inn – og avskiping og ymiskt fyrifallandi arbeiði í sambandi við tær tænastur, sum vit bjóða á tí føroyska- og altjóða marknaðinum. Okkara tænastur eru innan logistik og shipping.

SO UM TÚ ERT navigatørur, teldustøðingur, HH`ari ella okkurt heilt annað, hevur góð samstarvsevnir, ert systematiskur, tekur eina eyka hond í, tá á stendur o.s. fr. ert tú kanska rætti persónurin til starvið.

VIT BJÓÐA TÆR eitt spennandi starv í einum óformellum umhvørvi, har vit til tíðir hava úr at gera. Lønina tosa vit okkum til rættis um.

UM TÚ KANST BYRJA beinanvegin, hevði tað verið tað besta, men vit eru hugaðir at bíða, um tað er tað, tú ynskir.

UM HETTA HEVUR TÍN ÁHUGA, so er tú vælkomin at seta teg í samband við Janus á tel 47 77 77.

Kloosterboer Terminal Faroe Islands er eitt frystihotell, har goymdar verða frysti- og kølivørur. Harumframt verður skipað fyri flutningi um allan heim. Vit eru við í Kloosterboer Group, sum hevur frystihotell í fleiri londum, umframt eitt altjóða flutningsnet.

www.kloosterboer.fo

tosarnir 558000

Pakkaferðir summarið 2002

*2 vaksin & 2 børn í bíli

Ferðist bíliga ...

Danmark

Danland* íbúðir
1 vika í frítíðarbúð 26.07. & 02.08.
úr 13.210,-

Dan Center* summarhús
1 vika í summarhúsi 26.07. & 02.08.
úr 12.793,-

Noreg

Pers Hotel* í Gol
1 vika í summarhúsi 29.07.
úr 7.658,-

Hetland

Easterhoull* Chalets
1 vika í summarhúsi 29.07.
úr 7.843,-

Pakkaferð - Ísland

Key Hotellini
við 7 daga innivist á hotelli í dupultkamari
úr 5.814,-
fyri hvønn

Sigl & Flúgv

Sigli verður annan vegin og flogið hinvegin
Tórshavn - Hanstholm
og Keypmannahavn - Vágar ella hinvegin
úr 2.550,-
fyri hvønn

SMYRIL LINE
www.smyril-line.fo
Tel 34 59 00
e-mail: booking@smyril-line.fo

Nógv áhugavert á stevnuni í Gøtu

Í grótbrotinum í Norðragøtu fara hálvvaksin og vaksin at spæla kowboy, og fyritøkur fara at rógva kapp í gummibátum. Eisini verður fótbóltsdystur millum gomlu føroyameistarar í 1992 og 1993, B68 og GÍ, og her verða flestu av gomlu »stjørnunum« við.

BYGDASTEVNA
Vilmund Jacobsen

Síðan fyrst í áttatiárunum hava gøtufólk skipað fyri bygdastevnu, og soleiðis verður eisini ár. Skráin hesaferð, sum fevnir um dagarnar, 19., 20. og 21. juli, er ikki minni áhugaverð enn hini árini – ja, helst er hon uppaftur meira forvitnislig og umfatandi enn nakrantíð áður.

»Stjørnur« á vøllin

Vit fara at tríva í nøkur av tiltøkunum, sum verða stevnudagarnar.

Størsta tiltakið á skránni fríggjakvøldið, var konsertin, sum byrjaði kl. 19 á sandinum í Syðrugøtu við fleiri kendum tónleikabólkum.

Í dag, leygardagin kl. 15, verður rættiligt lív í við fótbóltsvøllin; tá fara »gomlu« liðini hjá B68 og GÍ, sum vóru føroyameistarar ávikavist í 1992 og 1993, at spæla streypadyst, og fyrireikararnir siga, at liðini eru so gott sum fullmannað. Á GÍ-liðnum fara vit eitt nú at síggja »stjørnur« sum Símun Petur Justinussen og á B68-liðnum, Aksel Højgaard. Nógv onnur kend nøvn verða eisini at síggja á báðum liðunum.

Hjá teimum, sum ikki tíma at hyggja at fótbólti leygardagin, verður høvi at fara í Losjuna kl. 15 at hyggja eftir Angelu og klovnunum.

Kappróður og kowboy

Eitt av afturvendandi tiltøkunum á stevnunum í Gøtu, er tiltakið í bátahylinum. Her hevur verið skipað fyri ymiskum. Okkurt árið hevur verið glíming, har taparin fór í havið, og okkurt árið hevur verið skipað fyri kapprenning á fiskakassum úti í hylinum. Men hesaferð skipa gøtufólk fyri eini aðrari og ikki minni áhugaverdari kapping, sum verður seinnapartin leygardagin. Her fara 15 fyritøkur úr Eysturoy og Havn at rógva kapp í gummibátum. Hetta verður ein stafett-kapping, ið kann gerast rættiliga áhugaverd at síggja.

Stevna er í Gøtu hetta vikuskiftið við nógvum áhugaverdum og forvitnisligum tiltøkum á skránni.

Eitt annað áhugavert tiltak á stevnuni, er tað, ið rópt verður »paint-ball«. Hetta tiltak verður í grótbrotinum í Norðragøtu. Her verða hálvvaksin og vaksin, sum vilja luttaka, býtt í bólkar og fara síðan at skjóta eftir hvørjum øðrum. Tá ið tú verður raktur, kennist tað á kroppinum, og tú verður litaður. Aldursmark er fyri, hvør kann luttaka í hesum kappingum og tey, sum spæla kowboy, verða í serligari ketildrakt, hjálmi og brillum. Sagt verður, at hetta er eitt ógvuliga stuttligt spæl – eisini fyri vaksin fólk.

Edmund heldur røðu

Leygarkvøldið verður felagssangur á Oyruni við fýrverki, og tá fer løgtingsformaðurin, Edmund Joensen, at halda røðu.

Seinni verður dansur á Kambsdali, har Frændur fara at spæla.

Í Gøtu fegnast tey um, at útlit eru til gott veður stevnudagarnar, og tey vænta nógv fólk, bæði úr Gøtu, grannabygdunum og aðrastaðni.

Stóra summarútsøla okkara

byrjar mánadagin 22. juli kl. 09.00

Allar útsøluvørur -50%

Seytjan
í Klaksvík Tel. 456517
í Tórshavn Tel. 311305